# 200: Undirgrundin náddi hæddirnar



Mynd: Ólavur Frederiksen

**Aftur í ár megnaði 200 at liva upp til at vera eitt av bestu nøvnunum á G! í ár.**

G!FESTIVAL
Theodor E. D. Olsen
theodor@sosialurin.fo

200 vóru aftur í ár í toppformi, tá teir spældu á G!Festivalinum. Einki G! uttan 200! Tað søgdu teir í øllum førum sjálvir. Og kanska er okkurt um tað.

Løtan við 200 í fjør var minnilig. Hesaferð høvdu teir nakað at liva upp til, og tað er ikki altíð so lætt. Men tað meistraðu teir til UG!

200 kundu valt ta løttu loysnina og havt eina framførslu, ið líktist henni í fjør, við pappmasje-longutong og øðrum 200-merchandise. Ístaðin høvdu teir eina kula útgávukonsert uttan roks og hóvasták, har teir komu við gomlum tilfari og nýggjum løgum frá Graceland.

200 kom stak væl frá uppgávuni. Hóast tað fréttist, at teirra fasti ljóðmaður ikki var komin fram vegna mjørka í Vágum, og ein avloysari røkti hesa uppgávuna, so var ljóðið í topp. Ljósið var eisini ein fragd fyri eyga, og myndirnar aftan fyri av bólkinum riggaðu væl til framførsluna.

**Kjak úr Løgtinginum**

Tá 200 millum løgini spældi eitt samanklipt ljóðbrot úr frá kjakinum í Løgtinginum seinasta heyst, um samkynd skulu vera vard av antidiskriminatiónsparagraffini, var paradoksið fullkomið: Kjakið úr tinginum vísti, hvussu pínligt tað viðhvørt kann vera at kallast føroyingur, meðan løtan í góðveðrinum á sandinum prógvaði tað øvugta. Tað var ikki sørt, at fjøldin varð eitt sindur kløkk, tá røddirnir hjá monnum – og bara monnum – sum Karsten Hansen, Óla Breckmann og Gunnari Nattestad ávaraðu um, at tað fór at gangast Føroyum sum Sódomu og Gómorru, um hendan paragraff bleiv samtykt.

At definera list, sum nakað, ið skal flyta mørk, er eftir mínum tykki ein heldur smøl meting, tí góðska skal eisini til. Tónleikurin hjá 200 klárar tó bæði, tí hann er bæði væl skrivaður og spældur, og roynir at prika eitt sindur í ta føroysku moralballónina, ið stundum kann tykjast bara at víðkast heldur enn at bresta. Av tí sama kemur leikluturin hjá 200 í Føroyum at virka sum eitt slag av ventili, har satiran ger upp við alla misnýtslu av Halgubók og heimastýri.

Um 200 ár verða fløgurnar hjá bólkinum at finna á Landsskjalasavninum sum søguligt prógv um, hvussu tað var at búgva í Føroyum 2006. Hvussu nógv vit væntaðu av visjón 2015, hvat presturin í Hvalvík segði um 200 – og hvussu ótrúliga væl 200 spældi.



Mynd: Ólavur Frederiksen

## Poppkorn endaðu stóru barnaskránna á G!

22. jul 2006, 17:39

Sum altíð var tað Lillian Dalsgaard sum gjørdi framførsluna hjá Poppkorn verda at uppliva. Hon er sera glað og nærverandi á pallinum. Trygg, livandi og alla tíðina í sambandi við tey sum lurta.

Og so megnar hon tað sum hinar stóru gentufyrimyndirnar, t.d. Britney Spears og Ashley Simpson, ofta ikki gera: hon syngur live! Útskifting hevur verið millum hinar limirnar í vældámda gentubólkinum, men hetta ger ikki so stóran mun fyri konsertupplivingina, av tí at tað bara er Lillian sum syngur. Hinar dansa. Og so spæla tær at tær syngja viðhvørt, og tað sær løgið út. Tað hoyrist væl, at tónleikurin og kórsangurin eru "playback" – tað er onki loyndarmál – so tað hevði kanska verið líka gott bara at hildið seg til dansin. Ella enn betri; hvussu við live sangi allan vegin ígjøgnum?

Um tað er tí manningin er nýggj ella ei, so eru dansarinnurnar ikki líka glaðar og tryggar á pallinum sum stjørnan í bólkinum. Spell.

G! konsertin var annars góð. Bara løg av fløguni vóru spæld og fólk tóku væl ímóti. Børn, foreldur og eisini tey mitt ímillum.

bc

## G! fyri børnini

22. jul 2006, 16:31

Klokkan 14 byrjaði stóra barnaskráin á G! og Angela skipaði fyri. Sera nógv børn – og vaksin – vóru møtt upp á spæliplássinum. Á skránni vóru m.a. undirhald við Ludvík og ommu hansara, skattajakt við Kaptajn Reyðkál og Angelu sum sjórænara-Sally, ponyríðing og hárflætting.

Skatturin var sjálvandi funnin niðri á sandinum har tveir aðrir sjórænarar ansaðu honum. Áðrenn hann kundi gravast upp noyddust børnini at gera ymiskt fyri at fáa spakan frá eina sjórænaranum. Tey grulvaðu, lakkaðu og at enda kitlaðu tey sjórænaran til hann noyddist at geva teimum spakan. Og so fóru øll at grava. Skatturin, sum var ein kista á tremur av bommum, var skjótt funnin og øll børnini (og onkrar mammur eisini) fingu burturav.

Síðan gekk leiðin niðanaftur á spæliplássið, men har hendi onki og nógv børn ótolnaðust og rýmdu, áðrenn næsti parturin av tiltakinum byrjaði. Bárður Persson og Elin á Rógvu saman við dansigentum, undirhildu og spældu hittlagið Lort í býin og nýggja lagið Upp á tá, og hetta endaði barnatiltakið og gjørdi pallin kláran til Popkorn.

bc/nud

## 80ara rokkur við Sign

22. jul 2006, 19:28

Íslendsku tónleikarirnir í Sign hava leitað sær íblástur frá teimum góðu, gomlu legendunum úr 80unum. Teir nýttu allar spælireglur sum hoyra 80unum til – teir vóru smurdir, sangarin sang í falsett og niðurløgini vóru fangandi.

Tað sum gjørdi framførsluna hjá Sign feita var, at teir gera tað sum elska – og teir gjørdu tað 100%. Teir livdu veruliga við framførsluni, og hetta smittaði á teir fáu áhoyrararnar, sum høvdu leitað sær á spæliplássi í Syðrugøtu at lurta eftir íslendskum 80ara rokki.